# Skulu tryggjast betur ímóti trýsti frá arbeiðsgevarum



*Oddafólk í fakfeløgum er mangan undir hørðum trýsti frá arbeiðsgevarum, men nú skulu tey gerast betri før fyri at standa ímóti hesum trýsti. Her er nevndin í Føroya Arbeiðarafelag. Frá vinstru eru tey Karla Einarsson, Sunrid Vang, Georg F. Hansen, Agnar Olsen, Ingeborg Vinther, Poul Juul Festirstein og Páll Nielsen, løgfrøðingur*

**Føroya Arbeiðarafelag hevur samtykt at hækka limagjaldið og peningurin skal brúkast til at tryggja nevnarlimir og álitisfólk betri**

FØROYA ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nevndarlimir og álitisfólk í arbeiðarafeløgunum skulu nú tryggjast betri ímóti trýsti frá arbeiðsgevarunum.

Tað samtykti aðalfundurin hjá Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið.

Á aðalfundinum kom fram, at tey, sum eru nevndarlimir í fakfeløgunum og álitisfólk á arbeiðsplássuum, eru mangan undir hørðum trýsti frá arbeiðsgevarum fyri at síggja ímillum fingrarnar við, at vikið verður frá sáttmálanum. Og tað kemur eisini fyri, at tey verða hótt við uppsøgn, ella beinleiðis verða søgd upp, krevja tey, at sáttmálin verður hildin.

Hetta førir onkuntíð við sær, at slakað verður og at brot á sáttmálan verða góðtikin fyri ikki at missa arbeiðið.

Ført varð fram, at tað eru serliga álitisfólkini, sum eru fyri trýstið, tí tey eru bindiliðið ímillum arbeiðsfólkið og virkisleiðsluna. Men tað rakar eisini nevndarlimirnar í teimum einstøku arbeiðarafeløgunum.

Hesum fer Føroya Arbeiðarafelag nú at royna at byrgja upp fyri.

Tí fer felagið nú at stovna ein trygdargrunn, sum skal tryggja nevndarlimir og álitisfólk ímóti lønarmissi, tá ið tey verða søgd úr starvi fyri at krevja, at sáttmálin verður hildin.

Av tí sama er limagjaldið til Føroya Arbeiðarafelag hækkað nakað, men Ingeborg Vinther vil ikki siga, hvussu stór hækkingin er.

Hon sigur tó, at hon er ikki størri enn so, at tað er saktans til at bera hjá limunum.

Nú skal so eisini ein reglugerð gerast fyri hendan nýggja trygdargrunnin, sum ásetir akkurát, hvør skal hava rætt til útgjald og, hvussu stórt útgjaldið skal vera.



*Aðalfundurin í Føroya Arbeiðarafelag hevur gjørt av, at nógv meiri peningur skal brúkast til útbúgvingar og skeiðvirksemi*

# Arbeiðsfólk skulu útbúgvast betur

**Á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafelag varð samtykt at styrkja møguleikarnar fyri útbúgvingum munandi**

FA-AÐALFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Møguleikarnir fyri útbúgvingum skulu styrkjast munandi.

Tað varð samtykt á aðalfundi í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið.

Í hesum sambandi samtykti aðalfundurin at gera arbeiðsloysisgrunnin hjá Føroya Arbeiðarafelag til ein útbúgvingargrunn.

Føroya Arbeiðarafelag hevur ein arbeiðsloysisgrunn, men Ingeborg Vinther sigur, at á aðalfundinum varð ført fram, at tað eru so nógvir limir í felag, at grunnurin munar ov lítið, samstundis sum ALS er komið.

Men tað eru eisini tey, sum stúra fyri, at politiski myndugleikin hevði lagt arbeiðsloysisgrunnin undir seg, verður hann ikki broyttur og umskipaður, so at hann ikki kann rørast.

– Vit vita, at ætlaninr nú eru frammi um at ognartaka ALS, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum eiga.

– Og tá ætlanin er at taka ALS, kann arbeiðsloysisgrunnurin hjá Føroya Arbeiðarafelag avgjørt heldur ikki kenna seg tryggan, hóast talan er um ein grunn, sum limirnir í Føroya Arbeiðarafelag hava betalt, allan sum hann er. Men ALS er eisini ein grunnur, sum limirnir á Arbeiðsmarknaðinum eiga, men kortini eru røddir frammi um at ognartaka hann.

– Tí er tað best og tryggast, at arbeiðsloysisgrunnurin verður umskipaður so at hann ikki kann rørast, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at at sostatt verður hann umskipaður til ein útbúgvingargrunn, har avkastið av honum skal brúkast til útbúgvingar og skeið.

Uppskotið varð samtykt á aðalfundinum og nú skal so ein reglugerð gerast fyri tann nýggja útbúgvingargrunnin.

# Nevndin fekk álit



*Georg F. Hansen varð um vikuskiftið í afturvaldur til næstformann í Føroya Arbeiðarafelag. Tað hevur hann verið í nógv ár og tilsamans hevur hann verið í nevndini í yvir 15 ár*

**Allir tríggir nevndarlimirnir í Føroya Arbeiðarafelag, sum stóðu fyri vali, eru afturvaldir**

FA-AÐALFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið, fekk nevndin álitisváttan.

Tríggir nevndarlimir stóðu fyri vali og teir vórðu allir tríggir afturvaldir.

Teir, sum stóðu fyri vali, vóru Georg F. Hansen, næstformaður, úr Miðvági, Agnar Olsen úr Hósvík, Sunrid Vang úr Froðba og Margretha Rasmussen úr Fuglafirði og tey vórðu øll trý afturvald.

Hini trý í nevndini í Føroya Arbeiðarafelag, eru Karla Einarsson úr Runavík, Poul Juul Festirstein av Eiði og Ingeborg Vinther, forkvinna.

Annars fekk felagið ein nýggjan tiltakslim og tað er Maud Túgvustein úr Fuglafirði, sum er triði nevndarlimur. Hon varð vald fyri Jan Nielsen úr S&K, sum ikki tók við afturvali, eftirsum S&K fer úr Føroya Arbeiðarafelag á nýggjárinum.

Fyrsti tiltakslimur er Jógvan Páll Johannesen úr Haldórsvík og annar tiltakslimurin er Osmund Berg úr Skopun